Kyndil-stÍF 25-25 (12-15):

# Spennandi finala í væntu



*Tað var kanska fyrst og fremst Kyndil, sum var garantur fyri hørðum fysisikum spæli sunnudagin, men sum myndin vísir, so dugdu gestirnir tó eisini at taka eitt tak tann vegin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Eitt óvanliga væl tendrað Kyndils-lið gav strandingum ein knall-harðan dyst sunnudagin, og spenningurin frá hesum gevur vón um eina spennandi steypafinalu leygardagin**

MANSHONDBÓLTUR

*Jákup Mørk*

Tað var undanfrumframsýning (puha!) upp á steypafinaluna, tá StÍF vitjaði Kyndil sunnudasgin. Hetta eru júst tey bæði liðini, sum komandi leygardag skulu spæla steypafinalu, og tá dómaraparið eisini var hitt sama, sum skal døma tnan dystin, so vóru karmarnir meinlíkir teimum, sum eru um eina viku.

### Ferðin tóktist avgerandi

Og lat tað verða sagt alt fyri eitt. Verður talan um ein líknandi dyst komandi leygardag, so verða áskoðararnir ikki snýttir, tí samanumtikið var talan um ein av mest undirhaldandi dystunum, sum hava verið hetta kappingarárið.

Kyndil hevur annars havt sínar trupulleikar í ár, men hesaferð byrjaðu teir við buldur og brak. Uppskriftin tóktist heilt einfalt at seta ferðina í topp frá fyrsta bríksli, og móti óvanliga væl tendraða Kyndils-liðnum tóktist strandingarnir fyrstu løtuna mest sum skelkaðir.

Har var tó ein lítil vansi við spæliætlanini hjá Kyndli. Um leikferðin er einasta barometur, so helst einki lið í landinum sterkari enn júst StÍF, og tá teir fyrst høvdu fótað sær, so gav hetta eisini at bíta.Við leikandi venjaranum sum skipara, og Sveini Justinussen sum skarprættara kom Kyndils-verjan ferð eftir ferð undir trýst, og so hvørt sum minuttirnir gingu, vendist dysturin eisini.

### Bardu seg aftur

Seinastu minuttirnar undan steðginum tóktist tað einamest vera ein spurningur um, hvussu stór leiðslan hjá gestunum skuldi vera, meðan frustratiónirnar á grønu leikarunum gjørdist alt sjónligari. Og fyrstu løtuna eftir steðgin tóktist hetta bara at halda fram.

Men talan var kanska ikki bert um frustratiónir. Onkursvegna var hetta eisini úttrykk fyri, hvussu nógv kyndilsmenn løgdu í dystin, og kanska ikki minni, hvussu nógv teir løgdu í at vísa StÍF, at hóast teir eru oddalið, so skulu teir ikki rokna við nøkrum løttum dysti, tá steypafinalan er á skránni.

Og prógvið fyri, at tað var so, kom eisini seinasta korterið av dystinum. StÍF hevði tá eina leiðslu upp á seks mál, og gekk alt eftir bókini, so átti dysturin helst eisini at veri avgjørdur við hesum. Men Kyndil vildi tað øðrvísi. Áhaldandi hildu teir á at stríðast, tað var ikki sørt, at hetta ørkymlaðu strandingarnar. Teir vóru mest sum at sammeta við ein nevaleikara, sum hevur tveitt øll síni harðastu sløg eftir mótstøðumanninum, men tá hesin kortini reisist aftur hvørja ferð, fer ráðaloysi at valda.

Og strandingar tóktust júst ráðaleysir, móti áhaldandi fysiska spælinum hjá Kyndli.Í løtum høvdu teir ivaleyst eisini grein í, at dómararnir kundu sett harðari inn, men tað varð ikki gjørt, og sjálvir tóktust gestirnir so hvørt at gerast alsamt moyrari.

Úr 17-23 vann Kyndil seg fyrst upp á javnt, 24-24, og tá Janus Einar Sørensen so av strikuni sendi bóltin í kassan, vóru eingi mørk fyri fagnaðinum av áskoðaraplássunum. Og tá strandingar so heldur ikki fingu mál í næstu royndini, átti alt at ligið opið hjá grønu monnunum. Við einum longum álopi høvdu sannlíkindini fyri einum sigri í øllum førum verið størri, men tá Jacob Jónsson eftir bert fáum sekundum sá sær ein møguleika, royndi hann at avgera dystin. Skotið brast tó á stongina, og tá Artur Johansen í seinasta strandaálopinum vann sær brotskast, mundu øll í høllini halda ondini.

Alexandur Johansen varð settur at skjóta, og hóast trýstið var stórt, so helt hann høvdið kalt, tá hann sendi heilt niður við vinstra stólpa. Kyndil hevði bert sekundir eftir at taka seinasta stikkið, og tað var ov lítið.

### Finaluspenningur

Við atlitið til landskappingina, so er einki at ivast í, at hetta gjørdi spenningin í oddinum enn størri, nú øll tey trý fremstu liðini hava mist stig har, sum tað annars ikki var væntandi.

Atlitið til steypafinaluna var tó kanska tað, sum vigaði meira hendan dagin hjá áskoðarunum, og einki er at ivast í, at hesi nú hava alla orsøk til at gleða seg til eina spennandi finalu. Megna kyndils-menn enn einaferð at seta seg eins væl upp, er í øllum førum einki at ivast í, at talan verður um ein sera truplan dyst hjá StÍF, har teir fáa tørv á øllum teimum dygdum, sum fram til nú hava ført teir fram í hondbóltsoddin.

Har verður talan um Johan móti Marian, Jacob móti Costin, Finnur móti Sveini og Artur móti Høgna. Stutt sagt, so verður leygardagurin dagurin, har hvør einasti leikari skal geva seg fult út, um talan skal gerast um steypasigur til hansara lið, og tað er í øllum førum eitt gott útgangsstøði undan einari finalu.

### Dysturin í tølum

**Kyndil-StÍF 25-25 (12-15)**

Málskjúttar:

Kyndil: Jacob Jónsson 8, Hans Áki Dal-Christiansen 4(1), Janus Einar Sørensen 3, Høgni Klein 3, Heini Bendtsen 3, Ken Zachariasen 2, Finnur Hansson 2

StÍF: Sveinur Justinussen 9(2), Alexandur Johansen 4(1), Artur Johanen 3, Costin Dumitrescu 3, Bent Djurhuus 2, André F. Danielsen 2

Brotskøst: Kyndil 3, StÍF 3

Útvísingar: Kyndil 2, StÍF 5

Dómarar úr Neistanum: Sámal Hansen & Kristian Johansen. Kundu kanska verið meira konsekventir at tveita út í løtum, men fyri undirhaldsvirðið í dystinum valdu teir tíbetur at lata spælið koyra sum longst, áðrenn fingrarnir vórðu nýttir.





*John Rødgaard vann hesaferð sítt talv, men tað hjálpti lítið hjá føroyameistarunum úr Vestmanna, sum nú mugu eina deild niður til komandi kappingarár*

# Vend kom í toppinum

**Klaksvíkingar vunnu seg, eftir eitt væleydnað dupultumfar í vikuskiftinum, framum stóra bunkan av toppliðunum í 1. deild**

TALV



*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Átta umfør eru nú leikt, tvey resta í, og enn er einki avgjørt. Als ikki. Framvegis er talan um fimm lið sum øll kunna vinna FM-heitið. Men greitt er at vent er í holuni, tí ikki longur eru tað havnarmenn sum eiga fyrsta pláss, eftir dupultumfarið í vikuskiftinum.

Klaksvíkingar vunnu tveir tryggar 3-1 sigrar, ávíkavist móti hvalvíkingum leygardagin, og sunnudagin móti kollfirðingum. Serliga hevur Ólavur Simonsen víst tenn, og prógvað seg sum ein verdugan topptelvara. Hann hevur nú heili seks stig av átta møguligum á fyrsta borði, og er hann samstundis eisini toppskorari á fremsta borði í deildini. Talvið ímóti Hans Kristian Simonsen sunnudagin var eftir øllum at døma ein sonn perla.

Eisini hevur Rani Nolsøe vunnið sær nøkur kærkomin stig, eftir at nærum einki gekk honum til vildars fyrstu seks umførini. Rani vann í vikuskiftinum á Finnbjørn Zachariassen, og leikti javnleik móti Torbjørn Thomsen. Veðrið var ótespiligt sunnudagin, og hetta viðførdi at kollfirðingar máttu yvirnátta í Klaksvík vegna veður. Væl og leingi varð tí analyserað eftir dystin.

### Toftamenn klintra væl rætta vegin

Ein 2-2 dystur og eitt 1-3 tap varð úrtøkan hjá fyrrverandi oddaliðinum úr Havn. Javnleikurin móti vestmenningum leygardagin eru teir neyvan nøgdur við, serliga um vit hava í huga, at teir hittu vestmenningar uttan IM John Rødgaard á liðnum í sjeynda umfari.

Dysturin millum havnarmenn og toftamenn gav sigur til útiliðið. Eitt heldur óvæntað úrslit. Heimaliðið var nakað skert. Tað tykist sum um aftaru borðini hjá toftamonnum nú eisini eru í holtur við at slúka stig inn.

Olaf Berg vann á føroyameistaranum frá 1987, Boga Ziska. Olaf hevur røkt fyrsta borðið (Martin Poulsen burturstaddur) væl, og hevur nú eftir eina óstøðuga byrjan 50% skoru, fýra stig av átta.

Jens Kristian Hansen fær ikki 100% skoru í ár. Tað bleiv greitt eftir hansara javnleik móti Torbjørn Thomsen í dystinum millum toftamenn og kollfirðingar í sjeynda umfari. Men hinvegin vann drúgvi toftamaðurin aftur sunnudagin, hesaferð á Herluf Hansen, og hevur tí 7,5 stig av átta møguligum. Einastandandi.

### Umsíðir vann Rødgaard

Seinastu 2-3 árini hevur liðkappingin hjá einasta altjóða meistara okkara, John Rødgaard, ikki eydnast væl. Ferðingin frá Suðuroy til meginlandi hvørt leikumfar troyttar sjálvsagt, og hevur eitt nú sína orsøk til gongd hansara. Hann hevur tó at kalla á hvørjum árið vunni taptu ratingstigini innaftur í einstaklinga-FM og á Talvolympiadum, soleiðis at hann eftir hvørt kappingarár umleið heldur sær á teimum 2300.

John vann sítt fyrsta talv í liðkappingini ímóti Martin Brekká, Hvalvík. Men lítið hjálpti, tí vestmenningar taptu hendan týðandi dyst 3-1. Teir muga nú við vissu tungu leiðina niður í 2. deild. Heili átta stig eru upp til kollfirðingar á fimta plássi. Spell fyri vestmenningar sum vunnu FM í fjør.

9. umfar verður leikt 02. mars. Hetta kemst millum annað av at, at NM fyri unglingar verður hildið í Føroyum í døgunum 14-16. februar. Telvað verður í Norðurlandahúsinum.

### Talvfelagið Føroyar heldur tørn

Fimta umfarið í vikuskiftinum var at kalla eitt lagnuumfar fyri útisetarnir í Keypmannahavn. Mótstøðuliðið var Helsingør, sum vóru næstfremstir í deildini, hálvt stig aftanfyri okkara lið. Dysturin var sera javnur, men við sindur av viðvindi høvdu vit vunnu dystin. Men so bleiv ikki. Dysturin endaði 4-4.

Teir sum vunnu vórðu; John Arni Nilssen, Eyðun Nolsøe og Terji Petersen. Javnleik fingu Carl Eli og Finn Nøhr, meðan IM Nicolaj Borge, Heini Olsen og Heini Danielsen taptu.

Tvey umfør resta í, og í mun til tey lið vit stríðast við, hava vit bestu kortini. Vit hitta nevnliga eitt botnlið og eitt miðlið.

### Toppurin í 2. deild

| | |
|---|---|
| Talvf. Føroyar | 23,5 |
| Helsingør | 23,0 |
| Hillerød | 22,5 |
| Fredriksberg | 21,5 |

Einstøku úrslitini higartil: IM Borge 3/5, John Arni 4/5, Heini O. 3,5/5, Eyðun N. 2,5/3, Carl Eli 3/5, Heini D. 2,5/5 Finn Nøhr 2/5, Terji P. 2/5 og Arild Rimestad 1/ 2.

## Kasparov — Deep Junior

Ein serligur talvdystur verður leiktur í hesum døgum. Heimsins besti telvari ímóti heimsins bestu talvteldu. Hetta ljóðar ikki ókent. Vit minnast jú tiltikna dystin í 1997, tá Garry Kasparov tapti 3,5 — 2,5 ímóti Deep Blue.

Deep Blue er farin í søguna, men Deep Fritz og Deep Junior eru talvteldur sum føra arvin víðari. Í oktober megnaði Vladimir Kramnik ikki at basa Deep Fritz. 4-4 bleiv úrslitið.

Kasparov vil nú av øllum alvi hevna seg inná tapið í 1997 (tá hann telvaði óvanliga illa), og ikki minst vil hann klára seg betur enn banamaður sín, Kramnik. At leika móti talvteldum er als ikki tað sama sum at telva móti kjøti og blóði. Kasparov er kendur fyri at hava mentalan yvirvág og sterkar nervar í mun til mótstøðumennirnir, men hesar fyrimunir hevur hann jú ikki ímóti nýggjastu talvtøknini.

Fýra talv eru leikt, av teimum seks talvunum sum telvast skulu. Støðan er 2-2, eftir at Kasparov í øllum førum í trimum teimum fyrstu talvunum, hevur havt byrjanar- og miðspæl fyrimunir. Men Deep Junior hevur víst øgiligar verjueginleikar, serliga í triða talvinum, har Kasparov hevði lítlan fyrimun leingi, men við eitt leikti Kasparov skeivt í tíðneyðini og teldan fann við tað sama vinnandi leikin.

Kasparov vann fyrsta talvið, seinna talvið bleiv javnt, Deep Junior vann sum sagt tað triða, meðan fjórða talvið varð javnt.

Soleiðis vann Deep Junior á Kasparov....

**Kasparov,G (2847) - Deep Junior**
FIDE Man vs Machine WCh New York (3), 30.01.2003

**1.d4 d5 2.c4 c6 3.Ric3 Rif6 4.e3 e6 5.Rif3 Ribd7 6.Fc2** (eins og í fyrsta talvinum. Ein byrjan sum tá gav Kasparov góðan fyrimun) **6...b6 7.cxd5 exd5 8.Bd3 Be7 9.Bd2 0—0 10.g4!** (Here we go! Sum í fyrsta talvinum langar Kasparov g-finnuna fram í eldin, og byrjar eitt álop) **10...Rixg4** (alt annað vildi verið ov passivt) **11.Rg1 Ridf6** [11...Rigf6 tykist meira náturligt, men teldan er jú ikki av gjørd úr náttúru...] **12.h3 Rih6 13.e4! dxe4 14.Bxh6 exd3 15.Rxg7+ [15.Bxg7 Rig4 og ein sera óklár støða uppstendur] 15...Kh8 16.Fxd3 Rg8 17.Rxg8+ Rixg8 18.Bf4 f6!** (ein verjuleikur sum vil nakað. Hvíti riddarin má ikki sleppa ov lætt í álop) **19.0—0—0 Bd6 20.Fe3 Bxf4 21.Fxf4 Bxh3!** Herfrá telvar teldan absolut feilfrítt verjuspæl **22.Rg1 Fb8 23.Fe3 Fd6 24.Rih4! (**Kasparov roynir at seta lítið trýst í gongd, og hetta eydnast eisini) **24...Be6 25.Rh1 Rd8 26.Rig6+ Kg7 27.Rif4 Bf5 28.Rice2** (næsti riddarin á veg til kongasíðuna) **28...Rie7 29.Rig3 Kh8 30.Rixf5 Rixf5 31.Fe4 Fd7**



(her hava vit kristisku støðuna. Kasparov er í tíðarneyð, men hevur higartil telvað væl, og hevur gott spæl fyri finnuna. Rig6+ Kg7 Rif4 Kh8 osv er lætt remis. Men....so hendir hetta) **32.Rh5? Rixd4!** [32...Fxd4 33.Rxh7+ Kxh7 34.Fxf5+ Kh8 35.Fh5+ Kg8 36.Fg6+ Kh8 37.Fh5+ Kg8 38.Fg6+ var ætlan Kasparovs...] **33.Rig6+ Kg8 34.Rie7+ Kf8 35.Rid5** [35.Rxh7 var planin, men Kasparov yvirsáð hetta: 35...Nb3+ 36.Kc2 Na1+ 37.Kc3 Fd2+ 38.Kc4 b5+ 39.Kc5 Fd6# kanska ikki so merkilgt at hann yvirsáð hetta mát í sínu tíðarneyð] **35...Fg7 36.Fxd4 Rxd5** ( 37.Rxd5 cxd5 38.Fxd5 Fg5+) **0—1**